## SÍ og ÍF í kvøld

Í kvøld klokkan 19 spæla SÍ og ÍF í Eik-liguni hjá monnum í høllini í Sørvági. Fyri SÍ ræður um at vinna, nú Fleyr setti stig til ímóti oddaliðnum, Mjølnir, sum er fimm stig framman fyri bæði SÍ og Fleyr. Hesi bæði liðini hava leingi kappast um at fáa hitt plássið í FM-finalunum, har Mjølnir longu hevur annan fótin. Hjá fuglfirðingum er setningurin hinvegin framvegis tann sami, sum hann hevur verið í allan vetur: At fáa fyrstu stigini.




## Sleppa at renna

Ein av afturvendandi kapprenningunum, Nýggjárshálvmaraton, sum er blivin útsett tvær ferðir, tí hálka og kavi hava forðað, verður nú langt um leingi leygardagin í hesi vikuni. Upprunaliga skuldi kappingin verða leygardagin 2. januar, men var útsett eina viku, og tá veðrið framvegis ikki var til vildar, var hon útsett eina viku aftrat. Men nú kavin og hálkan mestsum eru farin, sleppa rennararnir langt um leingi í gongd.



**Í næst seinasta umfarinum í finaluni sendi Magnus Andreassen allar tríggjar pílarnar í sentrum, og tað vissaði honum leiðsluna, sum eisini helt í seinasta umfarinum**

# Sterkasta kappingin nakrantíð

**Bæði í recurve- og í compoundbólkinum var talan um eina av teimum sterkastu kappingunum nakrantíð, tá bogaskjúttarnir kappaðust á Eiði sunnudagin**




Jákup Mørk

Jógvan Magnus Andreasen og Magnus Andreassen vóru sterkasta føroysku bogaskjúttarnir í recurve og compound sunnudagin, tá ein hin sterkasta kappingin í nógv ár var í ítróttarhøllini á Eiði.

### Jógvan Magnus tók alt

Í innleiðandi bólkinum í recurve vóru heili tríggir skjúttar omanfyri 540 stig, sum er eitt slag av gandatali í recurve í Føroyum.

Ert tú omanfyri 540 stig, merkir hetta ofta, at tú ert fremst í innleiðandi kappingini, men soleiðis var altso ikki í gjár, tí Hans Petur Højgaard, Absalon Hansen og Jógvan Magnus Andreasen fingu ávikavist 546, 545 og 545 stig innleiðandi.

Hetta merkir í grand prix kappingini, har innleiðandi úrslitini fyri allar kappingar gjøgnum veturin verða brúkt, at Hans Petur Højgaard vann sær 7 stig afturat og kom upp á annað pláss í kappingini. Absalon Hansen vann sær 5 stig, og Jógvan Magnus Andreasen vann 4 stig.

Hyggja vit at samlaðu stigatalvuni, so er Jógvan Magnus Andreasen fremstur í grand prix kappingini, meðan Absalon Hansen hevur triðja plássið, hóast hann bert hevur luttikið í tveimum kappingum av fýra.

Í finalunum vunnu teir tríggir fremstu seg víðari, men í hálvfinaluni koppaði Jógvan Magnus Andreasen Absalon Hansen, og kom tí í finaluna ímóti Hans Peturi Højgaard, sum frammanundan hevði vunnið sínar dystir.

Absalon Hansen megnaði tó at manna seg upp til bronsudystin og vann sannførandi á Torfinni Hansen.

Í finaluni gjørdist talan um ein spennandi dyst, men Jógvan Magnus Andreasen helt fram at vera eitt lítið vet betri enn mótstøðumaðurin, og er tí sterkasti finaluskjúttin í recurve beint nú.

### Ein Magnus afturat

Á sama hátt sum í recurve kappingini, var talan um sera góða skjóting í compound kappingini. Heili seks skjúttar skutu omanfyri 560 stig, sum vanliga merkir, at tú ert væl við.

Albert Dam var sterkastur innleiðandi, og er nú komin upp á 19 stig í grand prix kappingini. Hann er nú tvey stig frammanfyri Jógvan Niclasen, sum eisini gjørdist næstfremstur í innleiðandi kappingini sunnudagin.

Triðja pláss í grand prix kappingini hevur Magnus Andreassen, sum tó var nummar fýra í innleiðandi kappingini.

Yvirraskilsi hesaferð innleiðandi var Hans Asbjørn Eysturdal, sum við persónligum meti fekk triðja pláss innleiðandi.

Hóast nógvar broytingar plaga at henda í compound í finalunum, tí so stutt er í stigum millum skjúttarnar, so megnaðu teir fýra fremstu innleiðandi at koma í hálvfinalurnar.

Men tá hálvfinalurnar vóru avgreiddar, hevði Magnus Andreassen vunnið á Alberti Dam, og tí mátti Albert Dam taka til takkar við einum bronsudysti, meðan Magnus Andreassen, kom í finaluna.

Í hinari hálvfinaluni var talan um sera góða skjóting, men við 116 av 120 møguligum stigum, megnaði Jógvan Niclasen at vinna á teimum 114 stigunum hjá Hans Asbjørn Eysturdal.

Í bronsudystinum megnaði Hans Asbjørn Eysturdal at halda høvdinum køldum, og vann við 111 stigum á Alberti Dam. Fyrsta triðja plássið til Hans Asbjørn nakrantíð innandura.

Finaluna skutu teir báðir Jógvan Niclasen og Magnus Andreassen. Seks teir fyrstu pílarnar fylgdust skjúttarnir væl, men Jógvan Niclasen var eitt stig frammanfyri. Hesum vildi Magnus Andreassen ikki liva við, og skeyt allar tríggjar av næstu pílunum í miðjuna, og nú var unglingin frammmanfyri. Við seinastu pílunum megnaði Magnus at halda fast við leiðsluna, og vann tí kappingina.

## Odd aftur fremstur

**Hjá børnunum vann Odd Andreasen aftur. Hann hevur verið nærum ósigraður í ár, og bara Oddmar Nielsen hevur nakran møguleika at geva Odd kapping**




Eirikur í Jákupsstovu

Hjá børnunum hava Odd Andreasen og Oddmar Nielsen verið fremstu skjúttarnir gjøgnum allar kappingarnar í ár, og soleiðis bleiv aftur hesaferð.

Odd Andreasen hevur oftast drigið longra stráið av teimum, so í kappingini sunnudagin bleiv til vanligu kappingina, tá Odd vann á Oddmari í finaluni.

Hinir sjey skjúttarnir kappaðust tí um triðja pláss, og roknað var við, at kappingin kom at standa ímillum Marnar Magnussen og Inga Alfredsson, og soleiðis bleiv aftur hesaferð.

Seinast vann Ingi í bronsudystinum á Marnar, men nú býttu teir um pláss.

Hinvegin skutu fimm av teimum nýggju skjúttunum seg til persónlig met sunnudagin, so staðfestast kann at skjótingin hjá børnunum er í menning.